# Minnist til Reyða Kross í morgin

TÍÐINDASKRIV

Í morgin, leygardagin tann 3. oktober, millum klokkan 11 og klokkan 15. fer at banka á dyrnar í hvørjum einasta húsi landinum. Hetta er dagurin, har húsainnsavningin hjá Reyða Krossi Føroyar fer fram.

Fólk fara í húsini kring landið og øll hava møguleikan at stuðla tí manngóða arbeiði, sum Reyði Krossur Føroya stendur fyri kring heimin.

Sum nakað serligt hevur Hundaeigarafelag Føroya bjóðað seg fram, og limir tess fara við hundunum og bússunum at banka á dyrnar hjá fólki í Havnini.

Suni Vinther frá Reyða Krossi Føroya sigur, at hetta vikuskiftið er eitt innsavningarvikuskifti í øllum Norðurlondum og at pengarnir, sum koma inn fara lutvíst til neyðhjálp og eisini til menningarhjálp og undirvísing av børnum.

Eini 360 fólki eru við í innsavningini og í samband við hesa hava bankarnir opið leygardagin seinnapart, fyri at móttaka pengunum, sum inn eru komnir. Longu klokkan 16.00 eru tey fyrstu úrslitini tøk.

- Føroyingar eru raskir at veita Reyða Krossi ein beina. Føroyingar hava í miðal til seinastu innsavningarnar latið 13 krónur hvør, meðan hetta talið liggur á trimum krónum í Danmark, sigur Suni Vinther.



# Altjóða fokus á stomi

**Leygardagin 3. okt. er altjóða stomidagur. Á hesum degi verður kring allan heim ljós sett á viðurskiftini hjá teimum, ið er stomiskurðviðgjørd**

TÍÐINDASKRIV

Fyrsti altjóða stomidagur varð hildin 2. oktober í 1993, og eftir hetta tók altjóða stomifelagið avgerð um, at dagurin skuldi verða fyrsta leygardag í oktobur á triðja hvørjum ári.

### Stomi og tabu

Stomi merkir, at eitt stykki av tarminum ella bløðru verður lagt út ígjøgnum búkveggin, og ein stomisjúklingur má tí liva við einum posa á búkinum til land og skarn. Hetta brek er framvegis merkt av tabu, og kann tí vera trupult at tosa um. Endamálið við altjóða stomidegnum er júst at kunna um, hvat stomi í veruleikanum er, og at seta fokus á, at til ber at liva bæði væl og leingi, og eitt heilt vanligt lív við stomi.

Flestu teirra, sum fáa stomi, eru eldri enn 50 ár, og ofta er orsøkin krabbamein. Men eisini ung kunnu fáa stomi orsakað av kroniskum tarmbruna, eins og nýføðingar kunnu fáa stomi, eru teir føddir við álvarsomum breki í tarmunum.

Roknað verður við, at á leið 2 promillu av fólkinum hevur stomi, sum svarar til á leið 100 føroyingar.

### Krabbameinsfelagið og stomi

Krabbameinsfelagið hevur øll árini veitt hjálp og vegleiðing til fólk, ið hava fingið stomi – tað vil siga lagt tarm ella bløðru út á síðuna. Av tí at felagið metti, at tað var ein almenn uppgáva at taka sær av hesum sjúklingabólki, fór felagið í 1996 undir samstarv við Landssjúkrahúsið við tí endamáli, at fáa sett á stovn eitt stomiambulatorium, sum er dagdeild fyri stomi.

Í 1998 lat dagdeildin upp, tað fyrsta árið tó sum ein royndarverkætlan. Fólk tóku ógvuliga væl ímóti hesum tilboði, og royndirnar vóru so mikið góðar, at hetta var komið fyri at vera. Krabbameinsfelagið fegnast stórliga um ambulatoriið, tí hetta ger, at tænastan til fólk við stomi er á góðum og fakliga høgum støði.

Stomiambulatoriið á Landssjúkrahúsinum hevur opið ein dag um vikuna - hvønn hósdag seinnapart.

### Stomibólkurin

Undir Krabbameinsfelagnum er Stomibólkur, sum ein av sjálvhjáparbólkunum. Endamálið við bólkinum er at fólk við stomi kunnu veita stuðul og góð ráð til onnur, sum koma í somu støðu. Bólkurin hevur fund nakrar ferðir árliga, og skipar av og á fyri hugnaløtum, fyrilestrum e.l. fyri sjúklingar og avvarðandi.

Stomibólkurin er við í norðurlendskum samstarvi, og skipaði í fjør fyri norðurlendskum fundi í Føroyum, har á leið 25 fólk við stomi úr øllum norðurlondum luttóku.

# Billutir við nýggjum handli

Eyklutafyritøkan Billutir flytur í hesum døgum í nýggj og størri hølir við Hoyvíksvegin 61 í Havn.

Stjórin í Billutir, Petur Martin Johansen, sigur, at nýggi handilin verður gjørdur í samstarvi við Mekonomen, sum er størsta heilsølufyritøkan í Norðurlondum innan eykalutir, útgerð og amboð til bilar. Mekonomen er upprunaliga ein svensk fyritøka og hevur í løtuni 206 deildir í Svøríki, Norra og Danmark.

Billutir bleiv stovnað í Kollafirði í 1993. Í 2004 flutti fyritøkan til Havnar og hevur hildið til í Bókbindaragøtu. Fyritøkan hevur spesilaiserað seg í eykalutum til bilar, so sum plátulutir, útstoyt, lyktir og annars allar slitlutir - bæði brúktar og nýggjar.

Petur Martin roknar við, at handilin letur upp um hálvan oktober. Í dag eru tað Petur Martin Johansen og Høgni Mikkelsen, sum eiga Billutir, ið hevur fimm fólk í starvi.

*mg*




*Petur Martin Johansen framman fyri nýggja handilin við Hoyvíksvegin*

# Veðrauppboðsøla í Vestmanna

Teir 16 vestmenningarnir sum leiga Gómanskorð vóru í skorini mikudagin, og Bjartur Tórhallson, sum er ein av leigarunum, sigur, at tað gekk sera væl at fáa teir 28 veðrarnar upp úr skorini.

Seinasta fríggjadag var Bjartur í veðrasendingin hjá Rás2, har hann greiddi frá, hvussu teir fingu fatur á skorini, sum ikki hevði verið í brúk í fleiri ár. Hann greiddi eisini frá, at teir hildu gamlan sið, tá teir fóru í skorina. Teir syngja á donskum á eggjuni, áðrenn teir fara niður og halda eina stilla stund, sum teir gomlu plagdu at gera. Veðrarnir verða vigaði, áðrenn teir verða sleptir, og tá teir verða tiknir heimaftur. Í kvøld verður tann stóra felagsflettingin, so spenningurin er stórur í Vestmanna í kvøld.



Uppboðssølan: Í morgin, leygardagin, verður veðrauppboðssølan í Gørðum, kl. 16. Umframt veðrin, verður eisini høvi at bjóða upp á okkurt annað sum t.d.veðrahøvd.

Um veðrið ikki verður tilvildar, verður uppboðssølan hildin í einum av goymslubygningunum hjá Vest Pack, Inni á Fjørð. Peningurin sum kemur inn, fer óskerdur til útgerð at brúka í skorini

*- birgir*